# Løgtingsins Umboðsmaður kannar rok um aðalstjóra

**UTTANRÍKISRÁÐIÐ** Løgtingsins Umboðsmaður er nú biðin um at kanna málið málið út í æsir, tá ið aðalstjórin í uttanríkisráðnum varð settur fyrr í summar

Áki Bertholdsen

Búskapar og Løgfrøðingafelagið hevur nú heitt á Løgtingsins Umboðsmann um at kanna um alt fór rætt fram, tá ið illa umstrídda starvið sum aðalstjóri í uttanríkisráðnum varð sett fyrr í summar.

Tað váttar forkvinnan, Jóanna Djurhuus, fyri Sosialinum.

Hóast málið hevur verið nógv umrøtt, tykist eingin at hava fult innlit í tað og gitingarnar og illgitingrnar hava av somu orsøk verið nógvar.

Hon sigur, at Løgtingsins Umboðsmaður er tann einasti, sum hevur møguleika fyri at faa atgongd til alt skjalatilfarið í málinum, bæði bæði hvat viðvíkur sjálvari setanini og hvat fyrireikingini til setanina viðvíkur.

Millum annað sigur forkvinnan í felagnum, at tað er eingin loyna, at spurnartekin hevur verið sett við ymisk viðurskifti í sambandi við málið.

Í hesum sambandi hevur eisini spurningurin um gegni hjá limun í setanarbólkinum verið nevndur.

- Skuldi Umboðsmaðurin komið til ta niðurstøðu, at reglur um gegni ikki hava verið hildnar, skuldi natúrliga fylgjan av hesum verið, at setanartilgongdin gongur umaftur.

Felagið undraast eisini á, at løgmaður alment hevur nýtt fleiri ymsar grundgevingar fyri avgerðini um at seta.

Í Dimmalætting, í Kringvarpinum og á Løgtingsins røðarapalli hevur hann nevnt, at "avgerðin bygdi á eina heildarmeting". Hann hevur eisini sagt, at "tað hevði verið óhoyrt at gingið móti tilmælinum frá Jørgen Niclasen" og ein triðja grundgeving hevur verið "at setti aðalstjórin, eftir meting løgmans, var tann einasti, sum var førur fyri at fremja neyðugar skerjingar í sambandi við, at játtanin til Uttanríkisraðið fór at verða lækkað".

- Samanumtikið hava vit tískil heitt á Løgtingsins Umboðsmann um at kanna sum heild, um tey atlit, sum lógu til grund fyri avgerðini, vóru í samsvar við vanligar fyrisitingarrættarligar meginreglur og harvið lóglig, sigur Jóanna Djurhuus.

*aki@sosialurin.fo*

**» Eru reglurnar brotnar má natúrliga fylgjan vera, at setanartilgongdin gongur umaftur**



**UNDIR SJÓNEYKU**

*Løgtingsins Umboðsmaður er nú biðin um kanna um reglurnar um gegni vórðu hildnar og um annars alt fór rætt fram, tá ið illa umstríddi aðalstjórin í uttanríkisráðnum varð settur fyrr í summar*

BAKKAFROST

Føroya Banki og Bakkafrost:

Almennur íleggjarafundur

Almennur íleggjarafundur hjá Føroya Banka og Bakkafrost verður á Hotel Føroyum mánadagin 30. august kl. 15.00.

Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, og Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, leggja fram hálvársroknskapirnar.

Framløgurnar venda sær til verandi íleggjarar umfram áhugaðar framtíðaríleggjarar hjá fyritøkunum.

Fundurin er almennur, og eingin tilmelding er neyðug.

Tiltakið er ókeypis. Øll áhugað eru vælkomin.

SENDISTOVAN

FØROYABANKI

www.foroya.fo